Álit

í

løgtingsmáli nr. 9/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (COVID-19, dagpeningur vegna sóttarhald, dagpeningur til fólkapensjonistar, endurgjald til arbeiðsgevara, víðkaður rættur til sjálvstøðug vinnurekandi o.a.)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 13. august 2020, og eftir 1. viðgerð 13. august 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. august 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Fakfelagssamstarvið og við landsstýrismannin í almannamálum.

Trivnaðarnevndin metir, at tað er av alstórum týdningi, at skipanin verður longd, so at hjálparpakkarnir í sambandi við COVID-19 fylgjast at, soleiðis at rættarstøðan hjá borgarunum verður tryggjað.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 13. august 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Djóni Nolsøe Joensen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Frimodt Rasmussen